## Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

# FULLTRÚI TIL FÓLKASKÚLADEILDINA

**Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum fulltrúa til nýtt og spennandi starvsøki.**

**Starvið**
Í Fólkaskúladeildini er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja. Tann, ið settur verður, skal m.a. skipa fyri at seta í verk menningar- og eftirmetingarátøk í fólkaskúlanum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a., at:**
- fyrisita og tryggja menning og samstarv
- fyrisita og menna støðu- og landsroyndir
- útvega og greina hagtøl
- samskipa og skipa fyri felags tiltøkum innan økið
- fremja samstarv við skúlar/stovnar og ráð, ið økið varðar av
- taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini verkætlanarleiðslu, og
- røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum verða lagdar til fulltrúan

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella javnbjóðis útbúgving
- hava kunnleika til starvsøkið
- duga at samstarva, arbeiða sjálvstøðugt og í tvørgangandi verkætlanarbólkum
- eru tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Innan økið eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum fulltrúin kemur at fáa ávirkan á. M.a. verður arbeitt við at seta í verk støðugar eftirmetingarskipanir, gera lesiætlanir, seta í verk nýggjan próvtalsstiga, nýggjar reglur fyri próvtøkuroyndir og reglur fyri støðu- og landsroyndir, umframt reglur fyri tilboð til atferðartruplar næmingar.

Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti bæði innan- og uttanlands. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politiska myndugleikanum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og er týðandi partur av visjón 2015. Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjalahandfaring. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella e-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. september 2007, kl. 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355045 ella á 555045.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og miðnámsskúladeild og Mentamáladeild, umframt eina stápseind og eina fyrisitingareind. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
**Økið hjá Fólkaskúladeildini** fatar um allar fólkaskúlar, frískúlar, eftirskúlar, Sernámsdepilin, Skúlan á Trøðni, Frítíðarundirvísing, Føroya Fólkaháskúla, Húsarhaldsskúla Føroya, Føroya Skúlabókagrunn, Landsmiðstøðina og Musikkskúlaskipanina. Í deildini eru 4 starvsfólk.


# BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo

# Dansifelagið Fragdin Hósvík



Byrja verður at dansa sunnukvøldið 30. september í bygdarhúsinum í Hósvík.

Byrjunarholdið kl. 18-20
*(um nóg nógv tekna seg)*
Vand kl. 19-21

Nyggir limir ið duga at dansa vals og foxtrot eru hjartaliga vælkomnir

Dansiskeiðið 07/08 kostar kr. 600,-
við limagjaldi

Tilmelding á tlf.
422291 ella 265844

Dansifelagið Fragdin




Sosialurin
www.sosialurin.fo